SKÚVOYAR KOMMUNA

260 SKÚVOY
FØROYAR

Argir hin 2. februar 2012
Málsnr.: 10/00740-19
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivantsætlanin góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 02.02.2012, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, og § 6 stk. 3 í kunngerð nr. 186 frá 5. mai 1993 um spillivatnsevju, við seinni broytingum, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Skúvoyar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 21.12.2010 spillivatnsætlanina hjá Skúvoyar kommunu til góðkenningar (mál nr. 10/00740-1). Ætlanin er gjørd av PB Consult, ráðgevandi verkfrøðingum, og hevur Skúvoyar kommuna tann 01.02.2012 samtykt ætlanina, ið PB Consult hevur gjørt (mál nr. 10/00740-22).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Skúvoyar kommuna hevur tó søkt um undantak frá ásetingunum í § 10, stk. 1 og § 11, stk. 1 í kunngerðini um spillivatn fyri Stóra Dímun, sum sigur, at spillivatnsútleiðingar skulu leiðast út á sjógv og skulu í minsta lagi vera ein metur undir størstu fjøru.
Orsøkin til hetta er, at har er nógv brim og høgt berg. Spillivatn verður aftaná reinsing ført oman til eggjuna og niður í berginum.
Við omanfyri nevndu grundgevingum, verður undantak givið við heimild í § 11, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn.

IRF hevur ikki møguleika at tøma rottangan í Stóra Dímun, tískil hevur Skúvoyar kommuna eisini søkt um undantak um, at leiða spillivatnsevjuna óviðgjørda á sjógv. Mannagongd fyri tøming verður gjørd fyri at forða fyri smittuvanda og dálkingarampa..

Við heimild í § 6 stk. 3 í kunngerðini um spillivatnsevju[1], loyvir Umhvørvisstovan Skúvoyar kommunu, at leiða spillivatnsevju óviðgjørda á sjógv í Stóru Dímun.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum ella til smittuvanda, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Suni Petersen, settur deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn
PB Consult, Heykavegur 6b, Tórshavn

[1] Kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 um spillivatnsevju við seinni broytingum.